# Antikk list fyri lítlan pening

**Herfyri lat upp ein øðrvísi handil í Klaksvík, har ein bert hugsar um tað forvitnisliga innbúgvið og listina. Fólk hava tikið sera væl undir við handlinum**

HANDIL
Snorri Brend

**Klaksvík:** Símun Gullaksen hevði hug at royna okkurt nýtt.

Frá hugsan til veruleika var ikki so langt, tá hugskotið um henda sjáldsama handilin kom fram.

Hann fekk fatur á góðum sambondum í Danmark, og fyri nøkrum vikum síðani lat hann upp handil í Klaksvík.

Heitið í handlinum sigur alt um handilin: Hann eitur snøgt Antikk & List, og tað er eisini tað, sum myndar úrvalið í hesum handlinum.

## Blandað úrval

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein slíkur handil letur upp í Føroyum. Og tað er tí altíð við einum ávísum spenningi at ein fer undir slíkt.

Spurningurin er altíð, hvussu fólk fara at taka ímóti hesum. Hesum nýtist Símun kortini ikki at óttast fyri.

Hesar fyrstu fýra vikurnar hava rættiliga nógv fólk verið inni í handlinum og hava haraftrat ognað sær okkurt av tí forkunnuga, sum handilin hevur at bjóða kundunum.

Tá vit vitjaðu handilin fyrr í vikuni sást, at úrvalið var farið at minka í stóran mun.

– Men vit fáa nýggjar vørur aftur í næstu viku, kundi tann fryntliga handilskvinnan, Hannefía Joensen upplýsa fyri okkum.

Roynt verður at hava tað úrvalið sum kundin ynskir. Og tað fer eisini at sermerkja handilin í framtíðini.

Eitt annað sum kundin beinanvegin leggur merki til er at vørurnar eru sera bíligar. Tað er ikki allastaðni at til berat fáa eina stóra og vakra kistu fyri einans 5000 kr.

Men tað fært tú hjá antikk & List í Klaksvík.



*Hannefía Joensen hjálpir til í handlinum. Eyðna Festirstein er og vitjar*




# Starvsfólkaleiðari til Postverk Føroya

Ert tú ein góður og kveikjandi starvsfólkaleiðari? Setir tú tær greið mál, sum tú vilt røkka? Og skapar tú virkisfýsni rundan um teg?

Eitt spennandi starv sum starvsfólkaleiðari í P/f Postverki Føroya er leyst at søkja. Talan er um eitt nýtt starv, sum tann setti sjálvur verður við til at skapa og menna.

Postverk Føroya varð umskipað til eitt alment partafelag í 2005. Við umleggingini er lagt eitt nýtt grundarlag fyri P/f Postverk Føroya. Almenna partafelagið hevur fríari ræsur at menna seg tíðarhóskandi, og tað er eisini galdandi fyri starvsfólkadeildina, sum liggur undir stjórnarskrivstovuni í nýggja bygnaðinum.

**Starv og ábyrgd**
Starvsfólkaleiðarin varðar av umleið 300 fólkum. Talan er um ein fjøltáttaðan starvsfólkahóp, ið m.a. fevnir um postútberarar, sølu- og skrivstovufólk.

Starvsfólkaleiðarin skal uppbyggja eina nútímans starvsfólkadeild og stendur fyri arbeiðnum at orða ein nýggjan starvsfólkapolitikk fyri P/f Postverk Føroya. Ein spennandi avbjóðing í hesum sambandi verður saman við øðrum at broyta hugburðin í postverkinum, so hann samsvarar við nýggju krøvini.

Førleikamenning er eitt av lyklaorðunum. Starvsfólkaleiðarin skal standa fyri menningararbeiðnum á starvsfólkaøkinum og skal bera so í bandi, at starvsfólkini fáa ta regluligu menningina, sum krevst, nú postverkið stendur fyri nýggjum avbjóðingum. Starvsfólkamenningin verður framd við áhaldandi at granska tørvin á og seta í verk skeiðvirksemi, innanhýsis undirvísing og eftirútbúgving.

Postverk Føroya hevur tikið í nýtslu nýggja lønarskipan. Avbjóðingin verður at gagnnýta møguleikarnar í skipanini.

**Førleikar og krøv**
Umsøkjarar skulu hava eina hægri útbúgving og royndir á starvsfólkaøkinum.

Vit vænta, at tú hevur ein óhátíðarligan og álitisvekjandi stíl. Samstarv og samskifti eru sjálvsagdir partar í tínum arbeiðsháttí, og tú stórtrívist við at arbeiða í toymi. Tú dugir væl at seta teg inn í støðuna hjá øðrum, og við tínum innliti og kveikjandi ídni elur tú framfýsni millum tínar starvsfelagar.

Løn verður avtalað í samsvari við útbúgving og royndir.

**Umsókn og freist**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at spyrja teg fyri hjá Bergi í Garði, stjóra, á telefon 34 60 20.

Send eina umsókn við prógvum og viðkomandi ummælum innan 3. apríl klokkan 12. Umsóknin skal sendast til:

POSTVERK FØROYA P/f,
Bergur í Garði,
Óðinshædd 2,
Postboks 3009,
110 Tórshavn

Postverk Føroya P/f, Óðinshædd 2, Tel 34 60 00, Fax 34 60 03, www.postur.fo

Postverk Føroya